Um skyldu at geva upp skattskylduga inntøku fyri 2003

Øll, sum skulu veroa sett í skatt, skulu geva upp skattskyldugu inntøku sína, áorenn freistimar nioanfyri eru úti.

Til persónligar skattgjaldarar

Sjálvuppgávan av inntøkuni og inntøku av kapitalvinningi í 2008 hjá persónligum skattgjaldarum, io ikki hava roknskaparskyldu, skal vera innlatin til Toll og Skattstovu Føroya í seinasta lagi **mánadagin 15. mars 2004.**

Um hálvan februar sendir Toll- og Skattstova Føroya sjálvuppgávur út. **Øll, sum móttaka eina sjálvuppgávu, skulu senda hana innaftur.**

Teir persónar, Toll- og Skattstova Føroya metir seg at hava rættar upplysingar um í fyribilsskattaskránni, fáa tó eina skattauppgero, io er eitt blátt skjal. Hesi fáa onga sjálvuppgávu sendandi.

Eru upplysingarnar á skattauppgeroini ikki rættar, skal sjálvuppgáva sendast inn. Sjálvuppgávan fæst á økisskrivstovunum hjá Toll- og Skattstovu Føroya kring landio. Eisini er hon í bøklinginum 'Skatturin 2008' io varo sendur út til øll húski í desember 2008

Framskundao skattauppgero

Tey, io **ikki** hava annan frádrátt enn eftirlønargjald, og **ikki** hava B-inntøku, kunnu fáa framskundaoa skattauppgero, um tey innan 1. februar 2004 lata sjálvuppgávu inn til Toll og Skattstovuna. Á hesi sjálvuppgávu skal **bert gjaldio til eftirløn** í 2008 veroa upplyst og **skjalprógv skal violeggjast.**

Veroa aorar upplysingar skrivaoar á sjálvuppgávuna, sum t.d. B-inntøkur og/ella aorir frádrátt, verour hon at meta sum vanlig sjálvuppgáva, og vil tao siga, at **skattauppgeroin kann ikki roknast vio at veroa gjørd fyrr enn í fyrsta lagi í mars mánaoa.**

Ognaruppgero

í ár fáa øll eina ognaruppgero sendandi. Bert tey, sum hava broytingar í ogn og skuld í mun til 31. desember 2002, skulu lata hana innaftur.

Til feløg v.m.

Sjálvuppgávur, roknskapir og inntøkur av kapitalvinningi viovíkjandi árinum 2008 hjá deyosbúgvum, feløgum, felagsskapum v.m. vio roknskaparskyldu skulu vera **Økisskrivstovunum** hjá Toll- og Skattstovuni í hendi í seinasta lagi

1. juni 2004

um roknskaparskeio teirra endar í ella fellur saman vio álmanakkaárinum 2008

Umsókn um longda freist

Freistin verour bert longd um serlig orsøk er til tess, t.d. sjúka. Skrivlig umsókn skal sendast Toll- og Skattstovuni. Freistin verour givin eftir nærri avtalu í styttri tíoarskeio í senn, men kann tó ikki veroa givin longur enn til 15. august 2004.

Tá bicio verour um longda freist, skal hetta vera gjørt fyri hvørt felag sær og harafturat verour kravt at:

- umsóknin er send áorenn **1. juni 2004**
- sjálvuppgávur og roknskapir fyri eldri ár eru innkomin.

Til privat vinnurekandi

Sjálvuppgávur, roknskapir, ognaruppgeroir og inntøkur av kapitalvinningi viovíkjandi árinum 2008 hjá privatum vinnurekandi vio roknskaparskyldu skulu vera **Økisskrivstovunum** hjá Toll- og Skattstovu Føroya í hendi sum tilskilao nioanfyri:

Føoingardagur:	Seinasti innlatingardagur:
1/1 - 28/2	1. april 2004
1/3 - 30/4	1. mai 2004
1/5 - 30/6	1. juni 2004
1/7 - 31/8	1. juli 2004
1/9 - 31/12	15. august 2004

Um bácir hjúnafelagarnir hava skyldu at føra roknskap, kunnu bácir lata inn sambært tí freist, sum er galdandi fyri tann hjúnafelagan, sum hevur tann seinna føoingardagin.

Umsókn um longda freist

Freistin verour bert longd um serlig orsøk er til tess, t.d. sjúka. Skrivlig umsókn skal sendast Toll- og Skattstovuni. Freistin verour givin eftir nærri avtalu í styttri tíoarskeio í senn, men kann tó ikki veroa givin longur enn til 15. august 2004.

Tá bicio verour um longda freist, skal hetta vera gjørt fyri hvørt felag sær og harafturat verour kravt at:

- umsóknin er send, **áorenn nevndu innlatingarfreistir eru farnar**
- sjálvuppgávur, roknskapir og ognaruppgeroir fyri eldri ár eru innkomin

Kapitalvinningssjálvuppgáva

Saman vio vanligu sjálvuppgávuni verour eink kapitalvinningssjálvuppgáva eisini send øllum. Sí nærri frágreioing í bøklinginum 'Skatturin 2008'.

Kapitalvinningssjálvuppgávan skal latast innaftur vio somu freistum, sum eru galdandi fyri innlating av vanligu sjálvuppgávuni.

Persónar skulu ikki lata kapitalvinningssjálvuppgávu inn, um teir bert hava rentuinntøku frá Føroyskum peningastovni ella postgiro har skatturin er goldin.

Sjálvuppgávur, ognaruppgeroir og roknskapir eru roknao fyri at vera innlatin rættstundis, tá io tær/teir í seinasta lagi eru fingin Toll- og Skattstovu Føroya ella eru latin í postin í seinasta lagi omanfyri nevnda innlatingardag. Fellur seinasti innlatingardagurin á ein leygardag, sunnudag ella halgidag, verour seinasti innlatingardagur fyrsta eftirfylgjandi gerandisdag.

Um fullfíggjao sjálvuppgáva ikki er latin inn rættstundis, eins og frammanfyri er ásett, hevur Toll- og Skattstova Føroya heimild at meta inntøkuna og harafturat at áleggja sekt.

Vitjio eisini heimasíou stovnsins: www.tollskatt.fo

Argir, tann 15. januar 2004

Toll- og Skattarað Føroya

Nýggjar TANNPROTESUR
Broytingar og umvælingar av gomlum proteaum
Kliniskur tannteknikari
Bergur á Reynatrøð
Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
frigjadag frá kl. 9-12
Børkuvogur
620 Runavík
Tlf. 448480

UTTAN ÚR HEIMI

Fyrst á Mánan so á Mars

Seinasta ferðandi mánaferðin var í 1972. Hendan myndin vísir rúmferðarmannin Eugene Cernan uttan fyri mánaferðina 19. desember í 1972. Saman við honum á Mánanum var Harrison H. Schmitt

Ein stað skal byggjast á Mánanum, og rúmdarfar skulu flyta fólk upp á Mars. Tað er ætlanin hjá George W. Bush, forseta. Alt ov dýrt, siga onnur.

RÚMDIN

Árni Joensen
fortekst@post.dk

Tao eru meiri enn 30 ár, sioani amerikanaarnir seinast settu fótin á Mánan, men nú skulu teir uppaftur Fyrrakvøldio bao George W. Bush, forseti, Kongressina játta rúmdarumsitingini NASA pengar til nyggjar mánaferoir Fyrbils verour tívur á 12 milliardum dollarum tey næstu fimm árini.

– Lutum okkum endurvinna fótafestio á Mánanum og gera nyggjar ferðir longri út í rúmdina. Eg ímyndi mær, at vit kunnu byggja eina stjo á Mánanum, io kann virka sum eitt millumlio í mannaoum rúmdarferðum til Mars og kanska uppaftur longri út í rúmdina, segoi Bush.

Áheitanin hjá forsetanum um meiri pengar til rúmdarkanningar er nóg mikio, til at NASA kann fara undir at fyrireika ta stóru verketlanina.

Í fyrsta umfari verour neyougt at byggja eitt nytt rúmdarfar, sum skal kunna flyta fólk nógv longri út í rúmdina enn verandi rúmdarferjurnar kunnu. Tær veroa tilnar úr flúgving í 2010. Í 2008 skulu ómannao fór sendast upp á Mánan at gera klárt, so ein stjo kann byggjast har. Um somu fio skal USA taka seg burtur úr samstarvinum um altjóoa rúmdarstjóina.

Innan 2015 skulu teir fyrstu amerikonsku rúmdarmenninir seta seg á Mánanum, og fimm ár seinni er ætlanin at senda eitt rúmdarfar haoani og upp á gongustjórnina Mars.

– Mál okkara er, at fólk skulu búgva og arbeioa á Mánanum í longri tioarskeio, segoi Bush og melti ðorum londum til at taka lut í amerikonsku verketlanini.

Púra burturvið

Men rúmdaretlanin hjá forsetanum fer ikki undirtøku allastaoni. Fleiri politikarar, eisini flokstelagar hjá forsetanum, halda tao vera ábyrgdarleyst at tosa um slíkt, samstundis sum nsastórt hall er á amerikonsku figgjarlógini.

– Eg haldi, at sæo vio figgjadigum eygum er hetta púra burturvio. Bush hevur brúkt pengar, sum um vit hývdu so nógvar, at vit kunnu brenna teir sigur Stephen Moore, sum er formaour í einum konservativum bólki, sum annaos stoolar forsetan. Fleiri limir í Kongressini hava vist á, at ætlanin hjá forsetanum fer at kosta fleiri hundrao milliardir dollarar.

Onnur halda, at tann stóra rúmdaretlanin hevur bert til endamáls at tryggja Bush afturval á forsetavalinum 2. november.

Ein meiningakanning hjá tioindastovuni AP visir, at flestu amerikanaarnir taka undir vio rúmdargranskingum, men tá fólk vóru spurd, umpengarnir eiga at fara til rúmdargransking ella til heilsu- og skúlaverkio, svaraou 55 prosent, at so valdu tey heldur heilsuna og skúlan.

Brixtofte gevst ikki so

Sjálvt um fyrrverandi borgarstjórin í danska bynum Farum, Peter Brixtofte, eftir øllum at dømma skal ígjegnum eitt langt rettarmál um valdsmisnytslu og svik, hevur hann longu gjørt av at stilla upp til býráosvalio í 2005.

Hann ætlar sær tó ikki at vera borgarstjóri aftur, tí tao hevur hann verio nóg leingi, sigur hann vio Jyllandspostin. Á býráosvalinum í 2001 fekk tann umstridді vinstramaourin meini enn 4.000 persónligar atkvøour, og tao var nóg mikio til at geva Vinstra tryggan meirihluta í býráonum. Men tá fjólmiolarnir avdúkaou, at hann hevoi sitio ógvuliga leysur á kommunukassanum, og at hann hevoi nytt kommunalar pengar til annao enn tao, sum teir eru ætlaoir til, mátti hann leggja frá sær í mai í 2002.

Lógreglan kannar framvegis málio um Peter Bristofte, og tao kann vel henda, at hann verour dømdur í byarrettinum í Hillerød, áorenn val verour aftur. Men hann hevur longu booao frá, at verour hann dømdur sekur, verour dómurin skotin inn fyri eystara landsrætt.

Reiðarar í neyð

Norski vinnumálaráðharin, Einar Gabrielsen, vil hava Stortingio at laga skattaviðurskiftini og onnur viðurskifti soleiðis, at tey norsku farmaskipini veroa verandi skrásett í Noregi.

Seinastu árini eru fleiri norsk farmaskip farin í fremmanda skráseting, tí tao gevur teimum fleiri fyrimunir. Samstundis hava kapitalsterkar kreftir uttanlands keypt fleiri norsk skip og reioarí. Eitt nú keypti eitt felag í Hongkong tao stóra norska reioarríio, Bergesen, í fjór. Norska reioarafelagio sigur, at fáa reioaríini ikki somu treytir at arbeioa undir sum útlendsk reioarí, fer tao at enda vio, at fleiri skip og reioaríir faa av landinum.

Samstundis ernorski handilsflotin undir altsamt veksandi trýst frá handilsskipaflotunum í ES-londunum. ES leggur í lótuni stóran dent á sjóflutningin, og so seint sum í november kunngjørdi ES-nevndin, at málio er, at ES skal flyta sínum vøruf á egnum kjøli.

Fáa bíligari útgerð

Sioani hann fór frá, hevur fyrrverandi amerikanski forsetin Bill Clinton lagt stóran dent á bardagan ímóti eyokvæmi, og hann hevur eisini fingio fleiri munagóo úslit.

Eitt teirra kom í gjár, tá tao bleiv kunngjørt, at Clinton-stovnurin hevur gjørt sáttmála vio fimm altjóoa fyrtøkur, sum gera teyndarútgero til eyokvæmissjúklingar. Stovnurin roknar vio, at vio hesum sáttmálanum fer tao at bera til at kanna fimm milliónir fólk í sekstan ávísum londum á einum munandi bíligari hátt enn higartil. Tey sekstan londini eru í Afrika og Kanbia, og teirra millum eru Suðurafrika, Mosambik, Rwanda og Tansania, har umleio ein tríoingur av øllum eyokvæmissjúklingunum í Afrika eru.

Sjálvur sigur Bill Clinton, at bíligari teyndir og bíligari heilivágur faa at geva meningarondunum mótgulleikar at vio gera fólk vio eyokvæmi og at tryggja, at tey fáa somu vio gero sum eyokvæmissjúklingar í teimum ríku londunum.

Amerikanskir hermenn taka lívið av sær

21 amerikanskir hermenn í Irak hava tikið lívið av sær.

SJÁLVMORÐ

Árni Joensen
fortekst@post.dk

Amerikanska verjumálaráðio Pentagon hevur sent nakrar seinfyoingar til Irak at kanna, hvat tao eru fyri tropulleikar, sum fáa hermenn at fremja sjálvmoro. Sambært hagtølum hjá Pentagon plaga umleio 10 av hvørjum 100.000 hermonnum at taka lívio av sær í fnoartio, men í Irak er meoaltalio oman fyri 13.

Hígartil hava amerikonsku myndugleikarnir váttao, at 21 hermenn hava tikio lívio av sær í Irak, men fleiri aorir tilburoir veroa kannaoir, og tí kann tao veruliga talio vera uppaftur stóri.

Hermenn, sum hava gjørt tenastu í Irak, men sum eru komnir heimaftur, eru ikki vio í hesum tølunum. Tao er almennt kent, at fleiri hermenn, sum eru komnir heimaftur, hava beint fyri konuni ella genturni og sioani sær sjálvum. Hemaoarleknin William Winkenwerder sigur vio Reuters, at eimir 2.500 hermenn, sum hava verio í Irak, eru á hertjoum í USA, har teir bioa eftir at fáa leknahjálp. Og talio veksur, sigur hann.

Fyrsta tokið

Fyri fyrstu ferð í tvey ár koyrdi eitt tok um mánadio ímillum India og Pakistan í gjár 65 ferðafólk vóru vio tokinum, og tey vóru stóðliga fagnao, tá tokio fór av stjoini í bynum Lahore.

Tao endurskipaoa toksambandio er tao fyrsta tekinio um linna ímillum teir báðar eftir at siggjindarnar India og Pakistan. Fyri bara tveimum árum síðani var stjoan ímillum londini so spent, at tao var um rappio, at kriggj brast á. Fyrr í hesum mánaðinum hittust pakistanski forsetin, Pervez Musharaf, og indiski forsetisráðharin, Atal Behari Vajpayee, og hetta var fyrsti fundur teirra í tvey ár.

Teir báðir samdust um at fara undir samráðingar, sum millum annao hava til endamáls at fáa enda á ósemjuna um Kashmir, sum hevur verio tann stóri stríðsspurningurin ímillum londini í mong ár.